BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

12. november 2024
Mál: 22/22133-97
Viðgjørt: -

Svar

upp á

§ 52a fyrispurning nr. 52-049/2024, eftir § 52 í Tingskipanini, frá Honnu Jensen, løgtingskvinnu, settur Djóna Nolsøe Joensen, landsstýrismanni í barna- og útbúgvingarmálum, um at útbúgva fleiri til at undirvísa í føroyskum sum annaðmál.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Er ætlanin at seta útbúgving í gongd aftur at útbúgva fólk til at undirvísa í føroyskum sum annaðmál?
2. Um ja, hvussu verður útbúgvingin skipað, og nær væntast hon at byrja?

Svar

Til 1: Tað er eingin ítøkilig ætlan í løtuni at seta somu útbúgving í gongd aftur, sum hevur verið gjøgnumført.

Sambært Undirvísingarstýrinum er kostnaðurin fyri 28 lesandi, um hildið verður fram við sama leisti sum seinast, uml. 8. mió. íroknað lestrargjald og niðurskurð fyri lærarar, ið taka útbúgvingina.

Um útbúgvingin skal fremjast í sama líki, so er neyðugt, at hetta verður uppraðfest fíggjarliga. Hetta kundi verið liður í nýggju integratiónslógini, sum verður fyrireikað.

Námsvísindadeildin arbeiðir við einum nýggjum leisti at skipa eftirútbúgvingar til lærarar í fólkaskúla og á miðnámi. Sambært hesum leistinum verða hesar útbúgvingar skipaðar við ávísum kravdum skeiðum og valskeiðum. Í hesum sambandi verður ætlandi eitt skeið í føroyskum sum annaðmál á 7,5 ECTS boðið út á heysti 2025 og eitt afturat í føroyskum sum annaðmál á 7,5 ECTS á vári 2026.

Í fyrstu syftu er hetta ikki ein beinleiðis eftirútbúgving í føroyskum sum annaðmál, men skeið, sum kunnu ganga inn í fleiri útbúgvingar og eftirútbúgvingar. Tó er ætlanin, at ein eftirútbúgving komandi árini verður í føroyskum sum annaðmál, har omanfyri nevndu skeið innganga..

Til 2: Sum nevnt er eingin ítøkilig ætlan í løtuni at bjóða somu útbúgving út aftur. Men arbeitt verður við eini nýggjari eftirútbúgvingarskipan, har eftirútbúgvingarskeið í føroyskum sum annaðmál kemur at verða ein týðandi partur.

BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Nevnast kann eisini, at júst nú verður lýst við einum adjunkt- ella lektarastarvi í føroyskum sum annaðmál á Føroyamálsdeildini, har viðkomandi kann vænta at arbeiða og undirvísa tvørtur um deildir, eitt nú á Námsvísindadeildini.

Vinarliga

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður